VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Bilasølufelagið

Løgtingsins Fíggjarnevnd

Att.: Eyðgunn Samuelsen, forkvinna

Tórshavn Thursday, November 6, 2025
Okkara tilv./Our ref.
5843-1834/
Tykkara tilv./Your ref.

Hoyringarskriv – LM-019/2025 (broyttar MVG-reglur fyri brúktar leigubilar)

Bilasølufelagið takkar fyri høvið at kunna senda inn hoyringarsvar til lógaruppskotið LM-019/2025, sum snýr seg um at broyta reglurnar fyri meirvirðisgjald (mvg) av brúktum leigubilum.

Felagið umboðar størstu bilasølur í landinum og hevur tí bæði ítøkiligar royndir og haldgóð tøl um, hvussu verandi skipan virkar í praksis.

Vit vilja við hesum gera vart við, at verandi skipan bæði er greið, virkar væl og tryggjar eina góða javnvág millum inntøkur landskassans, vinnulig virðisskapan og møguleikan hjá vanligum føroyingum at keypa ein lutfalsliga lítið brúktan bil til ein rímiligan prís.

Bilasølufelagið metir, at lógaruppskotið í verandi líki ikki fer at hava ta ávirkan, sum Fíggjarmálaráðið leggur upp til. Tvørturímóti fer tað at broyta virksemið á føroyska bilamarknaðinum, skerja inntøkurnar til landskassan og gera tað torførari hjá vanligum familjum at keypa bil.

Verandi skipan og javnvág á marknaðinum

Verandi lóggáva er greið og markar frádráttin á ein hátt, sum ger, at einans bíligir leigubilar fáa fyrimun av skipanini, tá fólk seinri keypa teir sum brúktir. Ferðafólk rinda tó full MVG av leiguni av bilinum. Dýrari leigubilar fáa ikki sama fyrimun, og tað ger reglurnar bæði rímiligar og rættvísar.

Við lógaruppskotinum verður henda javnvág brotin, og tað fer at hava skeivleikar og búskaparligar avleiðingar — bæði fyri brúkarar og vinnu, og ikki minst fyri landskassan.

Fíggjarlig árin og skeivar metingar

Hóast Fíggjarmálaráðið metir, at uppskotið fer at geva eina meirinntøku upp á umleið 15 mió. krónur, vísa royndir og tøl, at hetta er skeivt mett. Bilasølufelagið hevur gjørt eitt roknidømi við tølum úr lógaruppskotinum, sum vísir, at landskassin heldur fer at missa umleið 40 mió. krónur um árið.

Orsøkin er, at nógv fleiri leigubilar í staðin verða seldir av landinum heldur enn til føroyskar keyparar, um lógaruppskotið verður samtykt.

Tað merkir minni meirvirðisgjald av sølu, minni skrásetingargjøld í landskassan og truplari hjá vanligum fólki at keypa ein góðan bil.

Veruleikin á marknaðinum
Í dag verða umleið 400–450 leigubilar seldir í Føroyum og umleið aðrir 200 útfluttir árliga.
Við nýggju reglunum verður hendan javnvágin brotin, tí ein eyka skattur á umleið 40.000 krónur pr. bil ger tað ómøguligt at selja brúktu leigubilarnar í Føroyum.

Tað merkir, at leigubilafyritøkurnar fara at flyta bilarnar av landinum, og tá missa vit bæði arbeiðsvirksemi, skatt og MVG.

Dømi um skeivar metingar frammanundan
Hetta er ikki fyrstu ferð, at metingar frá Fíggjarmálaráðnum hava víst seg at vera skeivar.
Tá reglurnar fyri hybridbilar vórðu broyttar í 2023, varð væntað ein meirinntøka av skrásetingargjøldum á 32 mió. krónur, men úrslitið gjørdist eitt hall á 28 mió. krónur.

Sama var við elbilar í 2024, har væntaða meirinntøkan á 25 mió. krónur vendi til eitt hall á 13 mió. krónur. Munurin er sostatt nærum 100 mió. krónur tilsamans, og tað vísir, hvussu ótrygt tað er at byggja lógarbroytingar á teoretiskar metingar heldur enn á royndir úr veruleikanum.

Árin á brúkarar og samfelag
Hetta lógaruppskotið rakar fyrst og fremst vanliga føroyingin og barnafamiljurnar, sum hava tørv á einum tryggum og rímiligum bili.

Skipanin í dag gevur teimum møguleika at keypa ein góðan brúktan bil fyri ein prís, tey megna at rinda.

Um lógaruppskotið verður samtykt, verður hesin møguleikin burtur, og fleiri mugu halda fram við eldri og minni umhvørvisvinarligum bilum.

Vinnan hevur longu víst, at hon dugir at endurnýggja flotan á ein góðan hátt gjøgnum bæði sølu heima og útflutning. Men við hesum uppskoti verður føroyski marknaðurin turrlagdur, og útflutningur verður einasti møguleiki. Hetta er hvørki búskaparliga skynsamt ella samfelagsligt haldgott.

Møguligar tillagingar (um uppskotið verður framt)
Skuldi Løgtingið, hóast hesi mótmæli, valt at broyta reglurnar, mælir Bilasølufelagið til, at tað verður gjørt varliga og stigvíst. Ein møguleiki kundi verið at minkað frádráttin stigvíst yvir fýra ár, soleiðis at marknaðurin fær tíð at laga seg.

Eisini eigur at verða tikið fyrivarni fyri teimum bilum, sum longu eru skrásettir undir verandi skipan, soleiðis at hesar íløgur ikki missa sítt virði.

Samanumtikið
Samanumtikið er tað okkara greiða niðurstøða, at lógaruppskotið hvørki styrkir marknaðin, vinnuna ella fígging landskassans. Tvørturímóti fer tað at minka virksemið á føroyska bilamarknaðinum, skerja inntøkurnar til landskassan og gera tað torførari hjá vanliga føroyinginum at keypa bil.

Verandi lóggáva virkar, og hon eigur tí at verða varðveitt.

Vinarliga
Bilasølufelagið